KÍ-NSÍ 5-6 (2-4):

# Verjuparturin var farin í vetrarfrí

**Áskoðararnir sóu ellivu mál í Klaksvík, har báðir partar løgdu stóran dent á álopspartin, meðan tað varð hugsað minni um at verja**



*Málini vóru nógv í tali í Klaksvík sunnudagin. Ikki færri enn 11 av slagnum vórðu skotin, og av hesum áttu runavíkingarnir tey seks*
*Mynd: Norðlýsið*

KÍ-NSÍ
*Jóannes Hansen*

Tað vóru nógv høvi til lógvabrestir í heystarkuldanum í góðveðrinum í Klaksvík leygardagin. NSÍ vitjaði, og sum so ofta seinnu árini, so fóru teir svørtu og gulu avstað við øllum stigunum úr Klaksvík.

Talan var avgjørt ikki um taktiskar bindingar. Verjurnar vóru sum opnahjallar, og báðir partar hugsaðu nógv um at leypa á. Klaksvíkingar vóru fyri fyrstu ferð í nógvar vikur leysir av niðurflytingar hóttanini, og eftiransingarnar munnu hjá báðum pørtum ofta hava verið betri, enn tær vóru hesa ferð.

NSÍ vann 6-5. Eina løtu kring steðgin, tá ið NSÍ í átta minuttir økti frá 3-2 og til 6-2, tóktist talan fara at gerast um rættuligt skrædl. Men tá ið NSÍ miðskeiðis í 2. hálvleiki hevði skift báðar vongverjarnar út, var tað um reppið, at heimaliðið kom afturíaftur. Í níggju minuttir fingu teir trý mál, og síðsta korterið reið um snarið. KÍ royndi at leggja trýst á fyri at javna, og NSÍ hevði í fleiri snarálopum góðar málmøguleikar móti ikki serliga væl mannaðu KÍ verjuni.

Størsti spenningurin var kanska, um tað fór at eydnast Christian Høgna Jacobsen at staðfesta sína støðu sum toppskjútti. Undan síðsta umfarinum vóru NSÍ málrevurin og Sorin Anghel hjá EB/Streymi borð um borð við sekstan málum í part. Christian Høgni skoraði tvær ferðir í Klaksvík, og tað fegnaðust liðfelagarnir hjá honum og NSÍ áskoðararnir nógv um.

Eisini Hjalgrím Elttør hjá KÍ segði sannførandi farvæl, eftir at tað leingi ikki gekk nakað serligt hjá honum fyrr í hesum kappingarárinum. Hjalgrím skoraði trý at KÍ málunum.

## Málini

Tá ið ellivu mál verða skorað í einum og sama dysti, so sigur tað seg næstan sjálvt, at talan eisini verður um góð og væl spæld mál. Men tað er næstan eisini sjálvfylgja, at í fleiri førum verður talan um støður, tá ið verjan og málverjarnir kanska kunnu taka ábyrgd á seg.

Dánial Hansen, sum hesa ferð var sentralur miðvallari, setti hol á, tá ið eitt korter var farið. Eftir innlegg úr høgru stútaði hann móti málinum. Meinhardt Joensen hálvbjargaði, og Dánial var fyrstur á returbóltinum.

Hjalgrím Elttør javnaði til 1-1 átta minuttir eftir NSÍ leiðslumálið. Hann rak upp á tvørs kring brotsteigarmarkið, og tá ið hann royndi móti málinum, tók bólturin í verjuspælara og sigldi í boga omanfyri Jens Martin Knudsen.

Síðstu seks minuttirnar av fyrra umfarinum komu fýra mál. Christian Høgni Jacobsen legði NSÍ framum 2-1, eftir at KÍ hevði havt horna. NSÍ toppskjúttin var einsamallur móti tveimum klaksvíkingum, sum hann megnaði at sneiða framvið, áðrenn hann við vinstra beini sendi flatt í málið.

Í minuttinum aftaná økti Jónstein Petersen, sum so at siga á hvørjum ári skorar mál móti KÍ, hóast hann annars ikki fær so nógv mál, til 3-1. Eftir langt skifti úr høgru datt bólturin niður aftanfyri KÍ verjuna, Jónstein tamdi bóltin í brotsteigin, smekkaði til, málverjin hálvbjargaði, og NSÍ miðvallarin í vinstru var sjálvur fyrstur á returbóltinum.

So var 3-1. Í síðsta minuttinum av vanligum leiktíðini minkaði Ovi Nysted við stútara við handara stólpan um munin til 3-2, eftir at innlegg var komið innfyri úr vinstru. Og bólturin var ikki meiri enn givin upp aftur, og tað var farið undir tíðina, sum dómarin hevði lagt afturat, tá ið Helgi L. Petersen økti til 4-2. KÍ miðverjan sá alt annað enn sannførandi út, tá ið hon royndi at steðga langari framlegging frá Jens Martini Knudsen. Royndin miseydnaðist, Helgi gjørdist leysur og smekkaði til, táið hann var komin í brotsteigin.

Eftir steðgin helt NSÍ fram í somu øði, og KÍ var í gávuhýri. Munurin øktist til 5-2, tá ið KÍ málverjin misti hornasparksinnlegg. Eftir tvær ferðir aftur og fram smekkaði NSÍ miðverjin Óli Hansen bóltin í málið. Og so var tað, at Christian Høgni Jacobsen setti punktum fyri sínari málskjóting og málskjótingini hjá NSÍ í 2005. Hann royndi móti málinum, bólturin tók í stólpan og umvegis Meinhardt Joensen fór bólturin í málið, og so var støðan 6-2!

Tað eydnaðist KÍ at pynta um, men tað eydnaðist ikki heimaliðnum at fáa stig. Símun Joensen var meistari fyri 6-3 málinum eftir deyðbóltsstøðu og tvær ferðir aftur og fram. Og so var tað Hjalgrím Elttør, sum skoraði tvey mál. Serliga tað fyrra var snilt. Hjalgrím fekk høvi úr vinstru at fara framvið verjuni, og tá ið hann var komin í brotsteigin, smekkaði hann til, og bólturin fór í netið undir nærru samankomingini.

## FAKTA

**KÍ-NSÍ 5-6 (2-4)**
0-1: Dánial Hansen 15.
1-1: Hjalgrím Elttør 23.
1-2: Christian Høgni Jacobsen 39.
1-3: Jónstein Petersen 40.
2-3: Ovi Nysted 45.
2-4: Helgi L. Petersen 45.
2-5: Óli Hansen 48.
2-6: Christian Høgni Jacobsen 57.
3-6: Símun Joensen 68.
4-6: Hjalgrím Elttør 69.
5-6: Christian Høgni Jacobsen 77.
**Dómari:** Georg Rasmussen
**KÍ:** Meinhardt Joensen - Eyðun Klakstein (Leon Bjartalíð, 62.), Jan Andreasen, Niclas Niclassen, Harley Bertholdsen (Otto Jacobsen, 77.) - Arnhold Joensen (Kristoffur Jacobsen, 62.), Høgni Madsen, Símun Joensen, Heðin á Lakjuni - Ovi Nysted, Hjalgrím Elttør
**Gult kort:** Høgni Madsen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen (Kári Hansen, 75.), Óli Hansen, Viggo Johannesen, Sjúrður Jacobsen (Einar Hansen, 66.) - Andy Olsen, Jústinus R. Hansen, Dánial Hansen, Jónstein Petersen - Christian Høgni Jacobsen, Helgi L. Petersen
**Gult kort:** Andy Olsen, Einar Hansen

# Christian Høgni á ovastu rók

**Landsliðsspælarin fegnast serliga um, at tað loksins hevur eydnast honum at spæla heilt kappingarár á graslíki, uttan at hann hevur verið darvaður av skaðum**

TOPPSKJÚTTIN
*Jóannes Hansen*

Leygardagin skoraði Christian Høgni Jacobsen tvey mál í 6-5 NSÍ sigrinum í Klaksvík. Harvið gjørdist NSÍ álopsspælarin, sum hevur strembað seg alt nærri føstum plássi á landsliðnum, toppskjútti í fyrstu landskappingini, sum hevur fevnt um 27 umfør. Christian Høgni var við í øllum umførunum uttan tveimum, og tað hevur eydnast honum at skjóta átjan mál.

Málini eru ikki so mong, sum tey onkur ár hava verið hjá toppskjúttanum, tá ið talan bara hevur verið um átjan umfør. Bestu málskjúttarnir higartil hava verið Súni Fríði Johannesen og Uni Arge. Í ávikavíst 1995 og í 1997 skoraðu teir 24 mál fyri ávikavíst B68 og HB. Í 1994 skoraði John Petersen 21 ferðir fyri GÍ, og í 1996 og í 1998 vóru ávikavíst Kurt Mørkøre, KÍ, og Jákup á Borg, B36, toppskjúttar við 20 málum.

Christian Høgni Jacobsen er serliga væl nøgdur við, at tað í ár hevur borið honum til at spæla, uttan at hann hevur verið stórvegis plágaður av skaðum.

- Eg havi ofta hildið, at graslíkisvallirnir hava farið illa við knøunum. Í ár havi eg spælt í graslíkisskóm og ikki í fótbóltsskóm, sum hava verið ætlaðir til vanligt grasundirlag. Tað kann væl vera, at hetta hevur gjørt mun, og tað er heldur einki at ivast í, at nýggja slagið av graslíkisvallum er betri fyri liðbondini, enn teir gomlu graslíkisvallirnir vóru tað, heldur Christian Høgni Jacobsen.

NSÍ álopsspælarin harmast um, at teir ikki fingu eitt stig afturat og harvið rukku silvurmerkjunum.

- Vit hava vunnið nógv stig móti oddaliðunum, meðan vit fleiri ferðir hava klossað óneyðug stig burtur móti teimum lægru støddu feløgunum. Tað iðra vit okkum nógv um.

Tá ið hann verður spurdur um, hvat av teimum átjan málunum, hann minnist best afturá, svarar Christian Høgni Jacobsen, sum eisini í 2006 fer at spæla við NSÍ, soleiðis:

- Kanska var tað seinna málið móti HB í Runavík. Uppleggið til tað málið minnist eg serliga væl, tá ið eg tók bóltin afturum og nýtti skotfintu, áðrenn bólturin varð sendur í málið.

Christian Høgni skoraði bæði málini í 2-1 heimasigrinum á HB. Tilsaman hevur Christian Høgni skorað í trettan av teimum 25 umførunum, sum hann hevur verið á vøllinum. Eina ferð hevur hann gjørt trý mál, tríggjar ferðir hevur hann skorað tvey mál, og í níggju dystum hevur hann fingið eitt mál.

Tíggju teir bestu málskjúttarnir hava í ár verið Christian Høgni Jacobsen, NSÍ, 18 mál, Sorin Anghel, EB/Streymur, 16 mál, Jónhard Frederiksberg, Skála, 13 mál, Bogi Gregersen, Skál, 12 mál, Allan Mørkøre, B36, 11 mál, Sámal Joensen, GÍ, 11 mál, Hans á Lag, HB, 10 mál, Dan Djurhuus, VB, 10 mál, Súni Olsen, GÍ, 9 mál, Heðin á Lakjuni, KÍ, 9 mál, Hjalgrím Elttør, KÍ, 9 mál.